# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Økispsykiatriina

Til nýggj størv á Psyk. søkja vit eftir:
- 2 sjúkrarøktarfrøðingum til **Suðuroynna**
- 2 sjúkrarøktarfrøðingum til **Eysturoynna** á starvsbrøki 0,75 til setan 1. september 2007 ella eftir nærri avtalu.

Setunarstaðið er tann ambulanta økispsykiatriska viðgerðardeildin á Psykiatriska deplinum. Arbeiðsøkini eru Suðuroyggin og Eysturoyggin við skrivstovum á Tvøroyri og Runavík, har sjúkrarøktarfrøðingarnir í Heimatænastuni halda til. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við relevantar stovnar í Suðuroy, Eysturoy og Psykiatriska depilin í Tórshavn.

**Førleikakrøv**
- góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- royndir og fakligan áhuga í røkt og viðgerð av fólki við sálarligum trupulleikum
- viðkomandi eftirútbúgving er ein fyrimunur
- telduførleiki
- skal kunna arbeiða sjálvstøðugt, vera kreativ/ur og framhyggjandi
- duga at fáa ein konstruktivan dialog og tilknýti til brúkaran og avvarðandi

**Starvið umfatar**
- verða við til at uppbyggja økispsykiatri í Suðuroy ella í Eysturoy
- uppfylgjandi og uppsøkjandi arbeiði
- verða málgagnið hjá fólki við sálarligum trupulleikum
- bólka- og individuella samtaluterapi/undirvísing til brúkarar og avvarðandi
- verða við til at uppbyggja gott samstarv við relevantar samstarvspartar

**Vit bjóða**
- eitt spennandi arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleika fyri egnari menning
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- skeið/eftirútbúgving innan- og uttanhýsis, sum Psyk.depilin/Økis-psykiatriin skipa fyri

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Ænu Reinert, deildarleiðara, lokal 4170, ana.reinert@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 23. juli 2007 kl.12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til E3/E2

Á E3/E2 er eitt avloysarastarv vegna barnsburð á starvsbrøki 1,0 leyst at søkja til setan 1. september 2007 ella eftir avtalu til og við 31. mars 2008.

Eisini eru tvey avloysarastørv á starvsbrøki 1,0 leys at søkja til setan 1. september 2007 ella eftir avtalu til og við 31. december 2008.

Øll trý størvini eru í skiftandi vaktum. Møguleiki er fyri lægri brøki.

E3 er ein medisinsk deild við 9 seingjaplássum. Fakliga sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri. Arbeitt verður í tøttum tvørfakligum samstarvi við m.a. fysioterapeutar, ergoterapeutar, talupedagog og læknar. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna. E3 verður flutt saman við B7, á B7, tá B6 er liðugt umvælt.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum.Vit ynskja starvsfelagar við áhuga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskja-áskoðan og góð samstarvsevni. Búfólk á E2 verða flutt á aðrar stovnar seinast 31. desember 2008, tá E2 letur aftur.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- fakligan áhuga innan sergreinirnar

**Vit kunnu bjóða**
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga menning
- innleiðslu

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Monicu Brickman, deildarleiðara á E3/E2, lokal 6012.

**Umsóknarfreistin** er 23. juli 2007 kl.12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Barnadeildina

Á Barnadeildini B5 er eitt fast starv á starvsbrøki 1,0 leyst at søkja til setan frá 1. september 2007 ella eftir avtalu.

Eisini er eitt avloysarastarv vegna barnsburð á starvsbrøki 1,0 leyst at søkja til setan frá 1. oktober 2007 ella eftir avtalu til og við 30. apríl 2008.

Bæði størvini eru í skiftandi vaktum. Møguleiki er fyri lægri brøki.

Barnadeildin hevur pláss fyri 7 børnum í aldrinum 0 - 14 ár.
Deildin er júst umvæld og pláss er til barnaambulatorium.
Deildin er byrjað við THS (Talgild Heilsu Skipan).

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- røkt og viðgerð til børn í aldrinum 0-14 ár

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga kompotentar og virknar starvsfelagar
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur við nógvum avbjóðingum

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan røkt og viðgerð av børnum

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Tove Thomsen, deildarleiðara á Barnadeildini, lokal 6055 ella á t-post. totho@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 23. juli 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar, heilsurøkt./pleygarar til Psyk.

**Á Psykiatriska deplinum, D2** eru hesi størv í skiftandi vaktum leys at søkja til setan 1. august 2007.
- 1 fast starv sum sjúkrarøktarfrøðingur á starvsbrøki 0,7
- 2 farloyvisstørv sum sjúkrarøktarfrøð-ingur, heilsurøktari ella pleygari á starvsbrøki 1,0 til og við 31. desember 2007, við møguleika fyri leingjan.

Deildin er ein akut viðgerðardeild við nógvum spennandi avbjóðingum.Vit raðfesta samarbeiði og trivna høgt, og at starvsfólkið er í støðugari menning. Arbeitt verður áhaldandi við dygdarmenning av viðgerðini og umhvørvinum á deildini.

Vit starvast sum sjúkrarøktarfrøðingar, pleygarar og heilsurøktarar og arbeiða við kontaktpersónskipan og eftir miljøterapeutiskum meginreglum. Vit hava tætt samstarv við aðrar fakbókar, bæði innan- og uttanhýsis.

**Vit ynskja, at tú hevur**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktar-frøðingur, heilsurøktari ella pleygari
- góð samstarvsevnir
- hug at arbeiða við psykiatriskari sjúkrarøkt
- evni at "halda høvdið kalt" tá stendur á
- helst royndir innan psykiatriska sjúkrarøkt

**Við kunnu bjóða tær**
- dynamiskt, fjølbroytt og mennandi arbeiði
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- tvørfakligt samstarv
- ávirkan á fakligu menningina
- góða innleiðslu

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Birgit Andersen, deildarleiðara á D2, lokal 4002, BiAn@lsh.fo ella til Bergit Weihe, leið. sjúkrarøktarfr. lok. 4102, bergit@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 24. juli 2007 kl. 12.00

## Onnur størv

Sjúkrarøktarfrøðingar til G1 (Bráðfeingisdeildin)
Umsóknarfreistin er 9. juli 2007 kl. 12.00

Sjúkrarøktarfrøðingar til G3
Umsóknarfreistin er 16. juli 2007 kl. 12.00

Introduktiónsstarv í almen kirurgi
Umsóknarfreistin er 16. juli 2007

Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







# Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo